# Nólsoyingar funnu seg sjálvar í Sundalagnum



*Rómurin var øgiligur umborð á Nólsoyingi, eftir at teir høvdu vundið burturúr hinum tíggjumannaførunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Bátsformaðurin ásannar, at um teir ikki høvdu vunnið í Hvalvík, so hevði møguleikin fyri at vinna fyrsta FM heitið í fimtan ár longu verið burtur**

10-MANNAFØR
*Jóannes Hansen*

Eldur kom í FM kappingina millum 10-mannaførini leygardagin. Havnarbáturin hevði vundið burtur úr hinum í tveimum teimum fyrstu kappingunum í superliguni í kapppróðrinum. Sigur og sjey stig til havnarmenn leygardagin hevði havt so stórt glopp frá Havnarbátinum og aftur til hinar við sær, at tað hevði verið rættuliga ilt at ímynda sær annan FM vinnara enn Havnarbátin.

Havnarbáturin er framvegis best fyri í FM kappingini. Men nú hava hinar manningarnar og serliga teir á Nólsoyinginum fingið íblástur og orsøk til at halda, at tað skal bera til.

– Hevði Havnarbáturin vunnið hesa ferð, so høvdu teir heilt víst vunnið FM. Teir hava framvegis besta møguleikan. At vit fingu sjey stig hesa ferð ber við sær, at vit hava realistiskan møguleika, og honum fara vit eftir.

Nicolaj Falck er bátsformaður umborð á Nólsoyinginum, og hann er sum vera man ovurfegin um, at tað endiliga eydnaðist hjá teimum at fáa fult. Nólsoyingurin hevði fyrireikað seg so væl, sum tað bar til. Í vikuni uppundir Sundalagsstevnuna vandu teir á Hvalvík. Og tá ið teir komu á mál sum sigursharrar, var gleðin og gloymurin á havnarlagnum so stórur, at tað tóktist sum um, at talan var um vinnara í heimasjógvi. Tað var heldur ikki einki í hesum. Tveir av teimum umborð á Nólsoyinginum - brøðurnir Sámal Petur Olsen og Asbjørn Olsen, sum áður hava kappast við 6-mannafarinum Hvessingi - eru úr Hvalvík, og tá ið vertsbygdin ikki er størri enn so, enn at øll kenna øll, so var Nólsoyingurin 10-mannafarið, sum tey í Hvalvík, Streymnesi, Saksun og fleiri av grannabygdunum tóku á við.

*Hví vóru tit betri hesa ferð, enn tit hava verið hinar báðu ferðirnar?*

– Talan er um samanspæl av fleiri umstøðum og viðurskiftum. Kanska róði Havnarbáturin ikki so væl hesa ferð, sum hann hevur gjørt hinar báðu ferðirnar. Og hjá okkum gekk tað væl betri, enn tað hevur gjørt.

*Hvussu skal tað skiljast?*

– Bæði á Norðoyastevnu og Eystanstevnuni hava vit havt kensluna av, at báturin hjá okkum ikki gekk, sum hann átti at havt gjørt. Á Norðoyastevnu kiksaði endaspurturin hjá okkum, og á Skálafjørðinum var tað bara ikki okkara dagur. Vit vóru ikki uppsettir soleiðis, sum tað er alneyðugt at vera, um hugsningur skal vera um at vinna. Tað vóru vit í Hvalvík. Tað var skjótt, at vit fingu kensluna av, at manningin og báturin so at siga vórðu eitt. Samanspælið millum róðursmanning og manningina var fínt, og báturin gekk soleiðis, sum vit ikki hava upplivað fyrr í ár, og sum vit hava arbeitt fram ímóti og bíðað eftir.

*Hvussu gekk róðurin fyri seg?*

– Eysturoyingurin og Vestmenningurin fingu besta startin. Vit fingu einki serligan start. Tað fáa vit ongantíð. Hví tað er soleiðis, tað duga vit ikki at siga. Men vit fylgdu væl við. Hóast Havnarbáturin hevði vunnið báðar FM róðrarnar, sum høvdu verið frammanundan, so vistu vit, at talan fór at verða um stóra kapping frá øllum hinum. Tá ið vit komu á fimtan hundrað metra málið, tóku vit tíggju kraftug tøk. Tað mundaði so mikið, at vit komu framum allar hinar, og har eydnaðist tað okkum at vera allan teinin.

*Hevði tað stóran týdning, at tit so tíðliga vunnu oddasessin?*

– Talan er um positiva ringrás, sum øll tey, ið hava róð kapp og vunnið, ivaleyst kenna til. Tá ið stýrimaðurin segði okkum, at nú gekk báturin betri, enn hann hevði gjørt fyrr í ár, og tá ið hann segði, at nú vóru vit fremstir, og at vit gingu frá hinum bátunum, so gav hetta okkum eyka orku. Soleiðis er tað bara. Og royndirnar hjá okkum eru eisini, at hjá teimum, sum royna at elta tann fremsta, men sum síggja, at munurin leingist heldur enn at minka, verður tað uppaftur tyngri.

## 15 ár síðani seinasta FM

Á síðstu fimm hundrað metrunum var Nólsoyingur leysur av øllum hinum. Munurin bara longdist, og í endaspurtinum var Nólsoyingurin kanska tvær bátslongdir og meiri enn tað frammanfyri hinar.

Kortini tóktist tað sum um, at teir spentu alt tað í, sum teir orkaðu.

– Vit høvdu gott tak á, hussu tað stóð til við muninum millum okkum og Vágbingin og Havnarbátin, sum kappaðust aftanfyri okkum, og sum lógu tætt at okkum. Men stýrimaðurin var ikki heilt greiður yvir, hvussu tað stóð til í kappingini millum okkum og Hoyvíkingin. Hann lá so langt frá okkum, og stýrimaðurin ivaðist eitt sindur í, hvussu tað var við vísninginum á málinum. Hoyvíkingurin róði væl, og teir fara ivaleyst at verða vandamiklir tær næstu ferðirnar. Men tíbetur megnaðu teir ikki hesa ferð at gera nakað við okkum. Tað eru vit sjálvandi hjartans fegnir um, sigur Nicolaj Falck, bátsformaður á Nólsoyingi.

Manningin á Nólsoyinginum hevr drúgvar royndir í kapppróðri. Elsti maður verður fyrsta dagin 30, og tann yngsti er 19. Seks nólsoyingar eru við, og hinir koma ymsta staðni frá.

– Nólsoyingarnir hava róð mest sum út í eitt síðani í 1993. Hjá okkum hevur tað verið soleiðis, at fyrsta uppgávan hevur verið at stýra, og so er man farin at rógva. Nólsoyingurin hevur ikki vunnið FM síðani í 1989, so tú kanst ætla, at vit droyma um at uppliva tað, sum teir, ið vit sum ungir dreingir minnast, at teir, ið eru eldri enn vit, megnaðu fleiri ferðir í áttati árunum. Leygardagin gjørdu vit tað, sum var alneyðugt. Vit eru við í kappingini. Men vit ásanna, at hon verður tøtt og hørð. Havnarbáturin hevur víst, hvat hann megnar, og Hoyvíkingur, Vágbingur, Eysturoyingur og Vestmenningur mugu eisini roknast at hava realistiskan møguleika at vinna, staðfestir bátsformaðurin á Nólsoyingi.

Nólsoyingur hevur seks ferðir vunnið FM. Allar ferðirnar vóru í áttati árunum. Nólsoyingur var meistari í 1981 og 1982, 1985 og 1986 og 1988 og 1989.

Teir, sum umborð á Nólsoyinginum vunnu leygardagin í Hvalvík vóru Hans Jákup Jacobsen, Raidar Jacobsen, Høgni Niclasen, Roy Poulsen, Nicolaj Falck, Jakku Guttesen, Thomas Hjaltalin, Sámal Petur Olsen, Asbjørn Olsen, Brian Hansen og Aksel Joensen.

### 10-mannafør

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nólsoyingur | 09.49.09 |
| 2 | Havnarbáturin | 09.54.00 |
| 3 | Hoyvíkingur | 09.54.04 |
| 4 | Vágbingur | 09.55.06 |
| 5 | Eysturoyingur | 09.58.23 |
| 6 | Vestmenningur | 10.05.06 |



# Argjabáturin lá tvørur

**Men hóast starturin var alt annað enn góður hjá argjamonnum, so megnaðu hinir ikki at halda teir frá oddasessinum, sum teir tykjast hava tikið patent uppá**

8-MANNAFØR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Manningin umborð á Argjabátinum fegnast um tann triðja sigurin av trimum møguligum í FM-kappingini higartil*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tvær ferðir frammanundan hevði Argjabáturin verið sannførandi vinnari. Og aftur á Hvalvík eydnaðist tað argjamonnum at vinna. Tað var merkisvert. Argjabáturin var ikki fremstur beinanvegin. Teir høvdu alt annað enn góðan start, men kortini vóru teir á málinum eina bátslongd undan hinum.

Á 1500 metra málinum varð fasti starturin nýttur. Tað var fitt av høgættarvindi, og tá ið Argjabáturin var komin á mál, og viðhaldsfólkini, sum vóru farin norður eftir í vónini um, at tað hesa ferð skuldi eydnast eins væl hjá Argja Róðrarfelag, sum tað hevði gjørt á Skálafjørðinum, høvdu fagnað sínum báti og sínari manning, fekst frágreiðingin um, hví tað ikki hevði verið so sannførandi í startinum:

– Vit lógu næstan tvørir, tá ið startskotið gekk av. Tað eydnaðist tíbetur beinanvegin at rætta hann uppaftur. Vit mistu eitt sindur í fyrstu tøkunum. Men tað var ikki meiri, enn at vit megnaðu at vinna tað aftur, greiddu teir á Argjabátinum frá.

Kvívíkingurin og Nevið Reyða fingu besta startin. Kvívíkingurin var fremstur, og Nevið Reyða var næstfremstur. Kvívíkingurin var eina løtu kanska meiri enn eina hálva bátslongd frammanfyri Nevið Reyða og uppaftur meiri enn so frammanfyri Argjabátin.

Men argjamenn loftaðu sær skjótt. Á túsund metrunum høvdu teir lagt upp á síðuna av Nevinum Reyða, sum ikki megnaði at fylgja teimum, og so spentu teir eftir kvívíkingum. Argjamenn hava fyrr í summar sagt seg rokna við, at Kvívíkingur fór at geva teimum dyggari kapping, enn teir høvdu gjørt í fyrstu kappingini. Tað søgdu argjamenn, tí kvívíkingar fóru seinni undir venjingina, enn teir fóru á Argjum.

Hesa ferð helt Kvívíkingur longri tørn, enn hann hevði gjørt í tveimum teimum undanfarnu kappingunum. Men tá ið hálvur teinurin var rógvin, hevði Argjabáturin lagt seg upp á síðuna av Kvívíkinginum, og so gekk tað bara ein veg. Stútt og støðugt togaðu teir seigan í árarnar umborð á Argjabátinum, og tøkini vóru dygg og munagóð. Tað tóktist sum um treystleikin hjá teimum var størri, enn hann var umborð á hinum bátunum, og tá ið tað varð farið undir endaspurtin, var tað ikki ein spurningur, um Argjabáturin fór at vinna, men heldur hvussu sannførandi sigurin fór at verða.

Argjabáturin var meiri enn eina bátslongd frammanfyri Kvívíkingin, og í FM kappingini er munurin so mikið stórur nú, at tað ber illa til at ímynda sær annað, enn at Argjabáturin fer at vinna FM heitið, sum teir ikki hava átt síðani 2000. Í 2001 var Nevið Reyða meistari, í 2002 var tað Kvívíkingur, og í 2003 vann Ørvur FM.

Kappingin á Hvalvík vísti, at tað bara er Kvívíkingurin, sum kanska kann geva Argjabátinum kapping um fremsta plássið í einstøkum FM kappingum. Nevið Reyða, sum undanfarnu ferðirnar hevðí verið nummar tvey og trý, endaði hesa ferð á fjórða plássinum. Umframt at tapa kappingina um næstfremsta plássið við Kvívíking, so vórðu teir eisini ov stuttir í kappingini um bronsuplássið. Ørvur, sum er mannaður við ungum monnum, ið áður hava róð við 5-mannaførunum hjá Havnar Róðrarfelag, endaði á bronsuplássinum. Munurin á teimum báðum var ein skutur. Knørrur helt væl og virðiliga pláss sum nummar fimm og aftastur.

### 8-mannafør

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 07.55.21 |
| 2 | Kvívíkingur | 07.59.16 |
| 3 | Ørvur | 08.05.16 |
| 4 | Nevið Reyða | 08.06.17 |
| 5 | Knørrur | 08.15.15 |

# Tað er bara kapping um næstfremsta plássið

**Enn eina ferð staðfestu tær umborð á Jarnbardi, at tær eru einaráðandi, og at tað er lítið sannlíkt, at nakar skal megna at vinna á teimum**

6-MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Tað tykist ikki, sum um nakar ger nakað við kvinnurnar umborð á Jarnbardi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### 6-mannafør, kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 05.39.02 |
| 2 | Páll Fangi | 05.42.26 |
| 3 | Lómur | 05.43.56 |
| 4 | Gongurólvur | 05.51.39 |
| 5 | Víkingur | 05.54.32 |
| 6 | Sølmundur | 05.56.79 |
| 7 | Sundabáturin | 06.13.92 |

Jarnbardur eigur sínar trúføstu stuðlar. Tað sást væl í Hvalvík. Bæði tá ið kvinnurnar og tá ið menninir kappaðust og vunnu, og bæði tá ið báturin varð flotaður, og tá ið hann var drigin aftur.

Ivaleyst er áhugin hjá stuðlunum kveikjandi hjá róðrarfólkunum, og tað man eisini kennast hugaligt at vera stuðul hjá einum báti, tá ið manningarnar eru so stinnar, sum tær umborð á Jarnbardi hava verið higartil í ár.

Stinnastar av øllum eru kvinnurnar umborð á Jarnbardi. Á Hvalvík vunnu tær fyri triðju ferð av trimum í hesum kappingarárinum. Sigurin var sannførandi, og tað tað skal vilja heilt øðrvísi til í teimum fýra kappingunum, sum eru eftir í hesum róðrarárinum, um nakar skal taka fremsta plássið frá teimum í nakrari kapping.

Jarnbardur varð fremstur mest sum beinanvegin. Og hóast manningin ikki helt, at umstøðurnar at rógva vóru nakað serligar, so var tað skjótt, at hann var runnin eina bátslongd frá hinum bátunum.

Munurin øktist ongantíð til nógv meiri enn eina bátslongd. Men tað kendist næstan sum um, at tær umborð á Jarnbardi vóru nøgdar við henda munin. Um tær høvdu havt verið pressaðar, so høvdu tær ivaleyst havt knotur til at lagt uppaftur meiri í. Soleiðis kendist tað í hvussu so er.

Lómur av Argjum var leingi næstfremstur. Tær høvdu onkra løtuna hug at bjóða Jarnbardi eitt sindur av, men tað gjørdist ongantíð rættulig kapping.

Tá ið umleið hálvt málið var rógvið, bjóðaði Páll Fangi Lómi av í kappingini um næstfremsta plássið. Tann kappingin gjørdist long, og hon gjørdist tøtt. Páll Fangi vann ta kappingina, men munurin frá Páll Fanga og til Lóm var bara ein skutur ella so.

Innanfelags kapping í Havnar Róðrarfelag var um fjórða plássið. Gongurólvur vann á Víkingi. Munurin var eitt sindur meiri enn ein hálv bátslongd. Sølmundur var nummar seks, og kvinnurnar umborð á Sundabátinum noyddust enn eina ferð at ásanna, at tað framvegis væntar nógv í, áðrenn tær verða førar fyri at vera so væl við í kappingini, sum Sundabáturin er, tá ið menninir eru umborð.

Eingin megnaði at hótta Jarnbard. Ivaleyst fara summir av trúføstu stuðlunum við suður til Vágs, og út frá avrikunum og úrslitunum higartil er tað heilt væl skiljandi, um tað verður roknað við og væntað, at Jarnbardur eisini á Jóansøku fer at vera fyrstur á mál. Alt annað hevði verið heilt undarligt. Higartil hevur tað bara verið kappast um næstfremsta plássið.